*– Tað er ein ófyrigevilig synd at lata ein aldargamlan mentaarv forfarast og serstakliga um hann er so einastandandi og sermerktur sum tann føroyski dansurin sigur Loreena McKennitt í samrøðu við Jóannes Lamhauge*




## Loreena McKennitt:

# Ein sannur ferðandi eigur onga ferðaætlan

**– Eg vil siga, at eg eri ein pílagrímur, eins og øll eru pílagrímar á tann hátt, at vit nýta tey amboð og tær gávur vit hava til at ferðast í gjøgnum lívið, sigur sjáldsama songkvinnan og tónleikarin Loreena McKennitt**

SAMRØÐA
*Orð: Jóannes Lamhauge*
*Myndir: Jan Müller*

Onkur ríggin serskøltur hevur kanska hoyrt navnið fyrr, men tey flestu munnu ivaleyst halda, at talan er um okkurt slag av írskum øli. Neyvan man nøkur pera heldur fara at glimma, tá sagt verður, at Loreena McKennitt er eitt av heimsins virðiligastu nøvnum í keltiskum/eklektiskum tónleiki.

Loreena McKennitt er ein fimmti ára gomul reyðhærd genta úr Kanada. Hóast hon er úr Kanada, letur hon ongan iva vera um, at hon er av írskum-skotskum uppruna.

Hon hevur eitt skarpleitt andlitsbragd, lýsandi bleika húð og grá eygu. Hon hevur eina erpna men beina nøs, jøvn kvinnulig kjálkabein, tunnar eygnabrýr, og sjálvt um hon altíð hevur ývnan og stóran frunt, hevur hon eina høga írska pannu inni undir. Hon hevur 7 tónleikaútgávur á baki umframt tvær livandi fløgur og eina dvd. Men hóast hon hevur havt eina drúgva tónleikakarrieru, ið byrjaði í 1985, hevur hon havt eina trygga framgongd øll árini.

Fyrsta apríl var hon í Keypmannahavn har hon skuldi framføra í stóra Falconersalinum á Fredriksberg. Eg hitti hana nakrar tímar undan framførsluni.

### Loreena um seg sjálva

*Hvør er Loreena McKennitt, og hvussu vilt tú lýsa tín egna tónleik fyri einum, ið ikki kennir teg?*

– Eg vil siga, at eg eri ein pílagrímur, eins og øll eru pílagrímar á tann hátt, at vit nýta tey amboð og tær gávur vit hava til at ferðast í gjøgnum lívið, og øll royna vit sum frægast at draga ta meiningina vit kunnu burturúr tí. Tá eg hyggi at tí eg geri og tí eg havi gjørt, síggi eg, at eg havi heilt víst brúkt mínar egnu gávur og mína karrieru sum ein persónligan rannsakanarmiðil til at granska í teimum tingunum, ið eg haldi vera áhugaverd. Hetta eru ofta heilt grundleggjandi spurningar, sum hvat fær klótuna at mala, og hvat drívur okkum menniskju. Og eg haldi, at tað er undurfult at hava møguleikan til at nýta tónleikin, granskingina og ferðingina til at royna at kanna hesar spurningarnar. Tá eg so taki alt hetta aftur til tónleikin hjá mær og geri mínar upptøkur, so er úrslitið ofta at samanlíkna við eina ferðadagbók, ella ein skjalfesting av míni pílagrímsferð. Tað verður ofta sagt um mín tónleik, at tað er alheimstónleikur (world music) tí hann hevur íblástur úr so nógvum ymsum heimshornum, men hetta er eitt so ótrúliga breitt hugtak. Eg plagi sjálv at kalla tað ferðatónleikur (travel music).

*Pápi tín var fenaðarsølumaður, mamma tín var sjúkrasystir og tú vaks upp á einum bóndagarði í lítlu bygdini Manitoba í Kanada, men hvussu bar tað til, at tað júst var tann keltiski tónleikurin, ið gjørdist títt kall, og hvussu hendi tað?*

– Tað var nokk heldur tann keltiski tónleikurin, ið fann meg, enn eg hann. Eg sang í kóri og gekk til klavertímar sum smágenta, og tá eg bleiv eldri kom eg í samband við eitt livandi fólkatónleikaumhvørvi í Winnipeg, har eg gjørdist hugtikin av keltiskum og serstakliga traditionellum írskum, enskum og skotskum fólkatónleiki. Tað var næstan sum kærleiki við fyrsta eygnakasti, og eg varð beinanvegin drigin at hesum tónleikinum sum um hann var ein partur av mær og eg ein partur av honum, og tað hevði ikki so nógv at gera við tað, at eg sjálv eri av írsk-skotskum uppruna. Serstakliga var tað tónleikurin hjá bretska hørpuleikaranum Alan Stivell, sum dró meg. – Veit ikki um hann framførir longur. Eg keypti mær seinni eina brúkta hørpu, tá eg var í London einaferð í 1982, og so hevði eg so at siga gjørt mær eitt tónlistarligt“ image“. Fyrsta útgávan kom so trý ár seinni, tá eg hevði lært meg nøkulunda at spæla á hørpuna, men eg haldi ikki, at eg dugi so væl at spæla í dag, sum eg hevði ynskt mær.

Eg havi havt sera ringt við at kategorisera mín tónleik og at seta hann í ein ávísan bás, kanska serliga tí at íblásturin er so ymiskur. Fólk spyrja meg t.d., hvussu tað ber til, at eg fáist við keltiskan tónleik, tá eg komi úr Kanada, men sum keltiskur tilflytari í einum fleirmentanarligum samfelag, kennir ein eisini ein ávísan tørv á at kenna sínar egnu røtur, serliga tá tær vísa seg at vera aldargamlar.

Tá eg var yngri trúði eg, at keltarnir bara vóru ein vitleysur anarkistiskur hópur úr Skotlandi og Írlandi, men seinni lærdi eg so, at teir tvørturímóti vóru ein rúgva av blandaðum ættarbólkum, ið komu úr Mið- og Eysturevropu fyri eini 2500 árum síðani. Og upp gjøgnum øldirnar hava keltarnir so flutt seg – umframt eisini at verða trýstir av